Landsfelag Pensjónista

Tíðindaskriv

Týdningurin av eyka inntøku hjá fólkapensjónistum

Yvirlit yvir mótrokning av fólkapensjón í sambandi við eyka inntøku


Greinin snýr seg um, hvussu pensjónsnýskipanin, sum kom í gildi 1. januar 2020, ávirkar teir mongu pensjónistar, sum framvegis arbeiða aftaná at hava rokkið pensjónsaldur og hava eina eyka inntøka (egininntøka umframt fólkapensjón og Samhaldsfasta), alt eftir, um teir eru ógiftir ella giftir og eru føddir áðrenn ella aftaná 1953.

Fyri nakrar pensjónistar kann ein grein sum hendan við grafum og tølum tykjast í so turrisligur lesnaður. Men í veruleikanum er hon viðkomandi, eftir sum Landsfelag Pensjónista fleiri ferðir um vikuna fær fyrispurningar um pensjónir og eyka inntøkur. Tað eru sostatt fleiri, ið ikki kenna síni pensjónsviðurskifti og tí vil undirritaða í stuttum greiða frá, hvussu mótrokningin ávirkar pensjónistar.

Landsfelag Pensjónista hevur tí heitt á Almannamálaráðið um at greina, hvussu mótrokningin í fólkapensjónini er, tá ein hevur eyka inntøku útyvir fólkapensjónina og Samhaldsfasta (AMEG).

Ógiftur fólkapensjónistur føddur áðrenn 1953


Á grafi 1 sæst, at um ein onga eyka inntøku hevur, er fólkapensjónin við brennistuðli, viðbót og Samhaldfasta íalt kr. 14.439 um mánaðin áðrenn skatt. Tá ein hevur eina árliga eyka inntøku yvir kr. 45.000, lækkar viðbótin við 20 % av inntøkuni, tvs. at fyri hvørjar 100 kr., ein hevur í eyka inntøku, lækkar viðbótin við 20 kr. Brennistuðulin fellur burtur við eini árligari eyka inntøku uppá kr. 60.000. Viðbótin er fult mótroknað, tá eyka inntøkan er komin uppá kr. 271.260. Mánaðarliga grundupphæddin kr. 4.169 og Samhaldsfasti (AMEG) kr. 5.865 verða ikki mótroknað í samband við eyka inntøku, og er hetta galdandi fyri allar pensjónistar føddir áðrenn 1953.



Grafur 1

Giftur fólkapensjónistur, føddur áðrenn 1953 – ongin mótrokning millum hjún

Á grafi 2 sæst, at um ein onga eyka inntøku hevur, er fólkapensjónin við brennistuðli, viðbót og Samhaldfasta íalt kr. 12.526 um mánaðin áðrenn skatt. Brennistuðulin fellur burtur, við eini árliga eyka inntøku uppá kr. 80.000 fyri hjúnini tilsamans. Tá hvør einstakur hevur eina árliga eyka inntøku yvir kr. 45.000, lækkar viðbótin við 20 % av inntøkuni, tvs. at fyri hvørjar 100 kr. ein hevur í eyka inntøku lækkar viðbótin við 20 kr.. Viðbótin er fult mótroknað, tá árliga eyka inntøkan er komin upp á kr. 226.860.
Mánaðarliga grundupphæddin kr. 3.313 og Samhaldsfasti (AMEG) kr. 5.865 verða ikki mótroknað í samband við eyka inntøku, og er hetta galdandi fyri allar pensjónistar føddir áðrenn 1953.




Grafur 2

Giftur fólkapensjónistur, føddur áðrenn 1953 – mótroknað verður millum hjún

Grundupphæddin og útgjald frá Samhaldsfasta er altíð sama upphædd, uttan mun til um mótrokning millum hjún verður vald ella ikki vald. Mótrokning hevur týdning fyri viðbótina. Nøkur hava fyrimun av mótroknað verður millum hjún, meðan onnur hava fyrimun av, at pensjónin verður roknað hvør sær. Hjún, sum hava mótrokning millum sín, kunnu tilsamans hava inntøku á 90.000 kr. um árið, áðrenn viðbótin byrjar at lækka (brennistuðulin fellur tó burtur tá eyka inntøkan hjá báðum tilsamans er 80.000 kr.). Hjá teimum, sum onga eyka inntøku hava, er fólkapensjónin við brennistuðli og Samhaldsfasta ialt 12.526 kr. um mánaðin áðrenn skatt.

Grafur 3 vísir, hvussu pensjónin lækkar hjá teimum, sum hava valt mótrokning millum hjúnafelagar. Grafurin skal lesast soleiðis, at lønarinntøka ella privat pensjón (x-aksin) er inntøkan hjá báðum tilsamans. Fólkapensjón, brennistuðul og AMEG (y-aksin) er upphæddin í part. Tá eyka inntøkan fer upp um 90.000 kr., lækkar viðbótin hjá báðum tilsamans við eini upphædd svarandi til 20 % av eyka inntøkuni. T.v.s., fyri hvørjar 100 kr. í eyka inntøku lækka viðbøturnar hjá báðum við tilsamans 20 kr., sum er 10 kr. í part.


Viðbótin er fult mótroknað, tá samlaða eyka inntøkan er kr. 453.720. T.v.s., at um annar hjúnafelagin onga eyka inntøku hevur, so er viðbótin fult mótroknað, tá hin parturin hevur inntøku á 453.720 kr. Um hjúnafelagarnir hava neyvt somu inntøku, tá er viðbótin fult mótroknað, tá inntøkan er 226.860 kr. í part (sum tilsamans er 453.720 kr.)



Grafur 3

Ógiftur fólkapensjónistur, føddur í 1953 ella seinni


Á grafi 4 sæst, at um ein onga eyka inntøku hevur, er fólkapensjónin og Samhaldfasti íalt kr. 14.813 um mánaðin áðrenn skatt. Hevur ein pensjónistur eina eyka inntøku yvirkr. 45.000 verður mótroknað við 20 % í grundupphæddini til eyka inntøkan er kr. 295.140. Tá grundupphæddin er burtur, verður hildið fram við 25 % av viðbótini, tvs. fyri hvørjar 100 kr., ein hevur í eyka inntøku, lækkar grundupphæddin fyrst við 20 kr og síðan viðbótin við 25 kr. Tá árliga eyka inntøkan er hægri enn kr. 524.532, er grundupphæddin og viðbótin fult mótroknað.
Tvs. at tá er fólkapensjónin dottin burtur, men Samhaldsfasti (AMEG) verður ikki ávirkaður av inntøkuni.



Grafur 4

Giftur fólkapensjónistur, føddur í 1953 ella seinni

Á grafi 5 sæst, at um ein onga eyka inntøku hevur, er fólkapensjónin og Samhaldfasti íalt kr. 12.715 um mánaðin áðrenn skatt. Hevur ein pensjónistur eina eyka inntøku yvir kr. 45.000 verður mótroknað við 20 % í grundupphæddini til inntøkan er kr. 243.140, Tá grundupphæddin er burtur, verður hildið fram við 25 % av viðbótini, tvs. fyri hvørjar 100 kr, ein hevur í eyka inntøku, lækkar grundupphæddin fyrst við 20 kr og síðan viðbótin við 25 kr. Tá árliga eyka inntøkan er hægri enn kr. 413.556, er grundupphæddin og viðbótin fult mótroknað.
Tvs. at tá er fólkapensjónin dottin burtur, men Samhaldsfasti (AMEG) verður ikki ávirkaður av inntøkuni.



Grafur 5

Á heimasíðuni hjá Landsfelag Pensjónista www.eldri.fo/pensjón liggur útgreiningin frá Almannamálaráðnum, har man sær, hvussu pensjónin smb. pensjónsnýskipanini, galdandi frá 1. januar 2020, verður ávirkað við árligari eyka inntøku fyri hvørjar kr. 10.000.

Argir 19. mars 2021

Beate L. Samuelsen, forkvinna
Landsfelag Pensjónista